# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Tíggju milliónir Transportarar

Tað eru bert nakrar vikur síðan, Volkswagen høvdu stórt hátíðarhald í Hannover í Týsklandi, í sambandi við at 60 ár vóru liðin, síðan fyrsti VW Transporter koyrdi av samlibandinum í 1947.

Í desember 2007 gjørdu VW nógv burtur úr at Transportarin er seldur í 10 milliónum eindum. VW Transporter er ein bilur, sum nógvir aðrir bilaframleiðarar hava brúkt sum fyrimynd við t.d. vørubilum, minibussum og smáum lastbilum.

Fyrsti Volkswagen í Føroyum var ein Transporter minibussur, sum varð skrásettur 17. juli 1953. Tað var Carl A. Jensen, keypmaður í Kollafirði, ið átti bilin, sum hann brúkti til rutukoyring. Tað var P/F Farodane í Havn, sum umboðaði Volkswagen fyrstu árini.

mg




*VW Transporter er seldur í 10 milliónum eindum síðan 1947*



*Volkswagen Transporter frá 1962. Hesir vórðu í nógv ár nýttir sum rutubilar í Føroyum*

# Fimm stjørnur til Laguna og Mazda2

Nýggi Renault Laguna fekk fimm stjørnur og 36 av 37 møguligum stigum frá Euro NCAP (European New Car Assessment Programme).

Í grundgevingunum verður sagt, at Laguna hevur hópin av innbygdum trygdarskipanum sum t.d. airbag í forsetrinum, sum við sensorum í setrinum máta vektina á føraranum, og hvussu hann situr, tá óhappið hendir, soleiðis at púturnar blásast upp í mun til tað og ikki meira enn neyðugt. Laguna fæst við upp til átta airbag.

Sum eina eykatrygd hevur Laguna eina framkomna trygdarskipan, sum gevur meira trýst í hydraulisku bremsuskipanina, um førarin knappliga flytur fótin av spitaranum.



*Nýggi Renault Laguna fekk fimm stjørnur frá EuroNCAP*

Nýggi Mazda2, sum júst nú er komin á marknaðin, fekk eisini fimm stjørnur og besta karakter frá evropeisku testorganisatiónini EuroNCAP (European New Car Assessment Programme).

Í grundgevingunum verð- 0ur sagt, at Mazda2 er ein av tryggastu bilum í sínum klassa.

Ikki einans tey vaksnu eru væl vard í nýggja Mazda2, tað sama er galdandi fyri børnini. Mazda2 fekk 37 stig fyri trygdina hjá børnunum í bilinum.

Mazda2 er eisini kosin "Årets Bil i Danmark 2008".




*Mazda2 verður her krasjtestaður hjá EuroNCAP. Úrslitið gjørdist fimm stjørnur og besta karakter*